# Alonso vann í Malaysia

**Renault,Toyota og BMW/Williams á vinnaraskammilinum í Sepang, í eini kappkoyring ið enn einaferð boðaði frá, at 2005 verður eitt herligt formel 1 ár**

FORMEL 1

*Niels Uni Dam*
*nudam@hotmail.com*

Renault koyrarin Fernando Alonso vann koyringina frammafyri Jarno Trulli í Toyota og Nick Heidfeld í BMW/Williams. Fyri teir báðar fremstu var koyringin rættuliga støðug. Teir byrjaðu í fyrstu- og aðru byrjunarstøðu og hildu hesar støður alla koyringina.



*Pit-stoppið gekk eftir ætlan, og Alonso megnaði at halda oddastøðuni allan vegin á Sepang-breytini*

*Mynd: Reuters*

### Tað var ikki mín skyld

Seinastu koyring fyri tveimum vikum síðan, var tað liðfelagin hjá Alonsu, Giancarlo Fissichella sum vann. Hesuferð lá Fissichella leingi á triðja plássi. Men hansara dagur endaði heldur keðiliga. Við einans 20 umferðum eftir á mál, rendi Fissichella saman við Mark Webber í BMW/-Williams. Báðir bilar brotnaðu, og steðgaðu á staðnum.

Fissichella hevði trupulleikar við dekkunum, og teir báðir BMW/Williams koyrarnir Webber og Heidfeld og Toyota koyrarin Ralf Schumacher fingu hann aftur. Hjá Webber eydnaðist tað at sleppa framvið Fissichella. Men Fissichella royndi at vinna plássið aftur í næsta svingið. Men hann gleið inn í bilin hjá Webber sum royndi at halda plássið.

Hvørgin teirra vildi sunnudagin viðganga, at skuldin var teirra, men báðir mundu eiga fitt av skuldini.

Fyri Nick Heidfeld var hetta ein gyltur møguleiki, hann stýrdi bilin gjøgnum rokið av brotnum bilum og tók triðjapláss, og seks stig, sum BMW/Williams ivaleyst eru sera glaðir um.

Montoya endaði á fjórða plássi og gav McLaren/-Mercedes eitt sindur at gleðast um, ein dag har liðfelagin Kimi Räikkönen sá út til at endaði millum fremstu bilarnir, áðrenn hann punkteraði.

Á fimta plássi endaði Ralf Schumacher, sum eisini var byrjaður í fimtu støðu. Dagurin var rættuliga hendingarríkur fyri Ralf, sum millum annað rendi saman við, ja, ongum øðrum enn sama Webber. Fimta plássi gav Toyota tveir bilar í stigunum, og er eitt stórt herðaklapp til kanska mest skuffaða liðið í seinastu koyring.

Red Bull Racing og David Coulthard fingu sætta pláss, og vístu at góðu úrslitini fyri tveimum vikum síðan, ikki bert vóru hepni. Coulthard hevði ongan trupulleika við at halda heimsmeistaran Michael Schumacher aftanfyri seg á sjeynda plássi.

### Ferrari kreppa

Ein klók kona segði einaferð: "Formel 1 er ein ítróttur har 20 rasarabilar koyra runt og runt og so vinnur Michael Schumacher". Men nógv umbroytist á mansins ævi, og eisini hetta. Nú eru bert 18 bilar í formel 1, og Michael Schumacher og alt Ferrari liði tykist alt annað enn kappingarført.

Liðfelagin hjá Schumacher; Rubens Barrichello lá á ellinta plássið, tá hann vegna dekktrupulleikar gavst.

Schumacher er ivaleyst glaður fyri síni fyrstu stig í ár. Men hann segði við fjølmiðlarnar, at hann sjálvandi var ivasamur um sínar møguleikar at verja heimsmeistaraheitið, og vinna tað sætta ár á rað.

Ferrari brúka í løtuni eina tillagaða útgávu av 2004 bilinum. Ætlanin var at bíða við at brúka nýggja bilin til seinni í kappingarárinum, men tað skilst, at Ferrari skulu royndarkoyra nýggja bilin í vikuni, við atliti til at brúka hann í næstu koyring í Bahrain um tvær vikur, tað bíðar formel 1 heimurin eftir í spenningi.

## Søguligur dagur í Formel 1

Tá 23 ára gamli Fernando Alonso koyrdi fyrstur um málstrikuna sunnumorgunin okkara tíð, skrivaði hann formel 1 søgu. Alonso er fyrsti spaniumaður nakrantíð, sum hevur ligið á odda í kappingini um formel 1 meistaraheitið.

Eisini Red Bull koyrarin David Coulthard skrivaði formel 1 søgu. Við sínum trimum stigum fyri sætta pláss, gjørdist hann tann bretin, sum hevur fingið flest stig í formel 1 nakrantíð við 483 stigum í 177 koyringum. Hann fór sostatt framvið fyrrverandi heimsmeistaranum Nigel Mansell sum fekk 482 stig í 187 koyringum.

-NuD

## Teir nýggju motorarnir fóru í luftina

Nógv hevur verið tosað og skrivað um løgnu avgerðina hjá BAR/Honda at steðga báðum bilunum, áðrenn teir komu á mál í Melbourne, soleiðis, at teir fingu møguleika at skifta motor áðrenn koyringina í Sepang.

Men meðan tey flestu liðini, sum brúktu sama motor sum seinastu koyring, komu á mál, vóru tað BAR/Honda bilarnir hjá Jenson Button og Anthony Davidson sum vóru fyrstir at fáa motorbrek eftir bert tvær umferðir.

Jenson Button var sera atfinningarsamur móti liðnum, og helt støðuna vera sera ónøktandi. Vanligi royndarkoyrarin Anthony Davidson, sum avloysti tann sjúka Takuma Sato, var sum vera man keddur av at hann bert slapp at koyra tvær umferðir í síni fyrstu koyring, men segði seg ikki vera illan.

-NuD

## Støður, Formel 1

**Koyrarar**

| Navn | Land | Merki | Stig |
|---|---|---|---|
| Fernando Alonso | Spania | Renault | 16 |
| Giancarlo Fisichella | Italia | Renault | 10 |
| Rubens Barrichello | Brasil | Ferrari | 8 |
| Juan Pablo Montoya | Kolumbia | McLaren | 8 |
| David Coulthard | Stórabretland | Red Bull | 8 |
| Jarno Trulli | Italia | Toyota | 8 |
| Nick Heidfeld | Týskland | Williams | 6 |
| Ralf Schumacher | Týskland | Toyota | 4 |
| Mark Webber | Australia | Williams | 4 |
| Christian Klein | Eysturríki | Red Bull | 3 |
| Michael Schumacher | Týskland | Ferrari | 2 |
| Kimi Raikkonen | Finnland | McLaren | 1 |

**Bilar**

| **Merki** | **stig** |
|---|---|
| Renault | 26 |
| Toyota | 12 |
| Red Bull | 11 |
| Ferrari | 10 |
| Wiliams | 10 |
| McLaren | 9 |

## Malaysia

| | |
|---|---|
| 1 | Fernando Alonso |
| 2 | Jarno Trulli |
| 3 | Nick Heidfeld |
| 4 | Juan Pablo Montoya |
| 5 | Ralf Schumacher |
| 6 | David Coulthard |
| 7 | Michael Schumacher |
| 8 | Christian Klien |
| 9 | Kimi Raikkonen |
| 10 | Felipe Massa |
| 11 | Narain Karthikeyan |
| 12 | Tiago Monteiro |
| 13 | Christian Albers |
| ret | Rubens Barrichello |
| ret | Giancarlo Fisichella |
| ret | Mark Webber |
| ret | Jacques Villeneuve |
| ret | Jenson Button |
| ret | Anthony Davidson |
| ret | Patrick Friesacher |